# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Ruðuleiki um fíggjarlóg

Ein mótstríðandi útmelding fyri og onnur eftir. Hetta eru boðini, tá tað ræður um landsins mest týðandi lóg, fíggjarlógina fyri 2010.

Tað er ikki óvanligt, at fíggjarlógarviðgerðir taka drúgva tíð og hava nógvan turbulens við sær í skiftandi samgongum. Sjáldan koppar tó eitt landsstýri vegna ósemju um eina komandi fíggjarlóg.

Og vit eru so von við mótstríðandi sjónarmið millum fíggjarnevnd og landsstýri, tá tað nærkast endaligu viðgerðini av uppskotinum.

Tess sterkari formann tú hevur í Fíggjarnevndini, tess fleiri eru oftani neistarnir. Oftast festa teir ikki í, men vandin er so altíð har: at neistar gerast til eld og kynda bál. Men løgið nokk hendir tað so gott sum ongantíð, tá tað um fíggjarlógir ræður. Og helst verður gongdin tann sama í ár, hóast mong svørt skíggj.

Tað vit kenna til samgonguslit, so vísir søgan, at tað oftast eru einstøk mál so sum eitt skip, ein skúli ella ein ávís hurð, sum eru orsøkin.

Í skrivandi stund tykist tað sum um, at óløgini eru við at minka. Løgmaður boðar frá, at ein semja er í nánd, og hóast formaðurin í Fíggjarnevndini ikki sleppur at fáa síðsta orðið í tunnilsmálinum, so tykist eisini her verða semja í eygsjón. Onkur má geva seg, og so verður helst eisini í hesum málinum. Hvat so framtíðin fer at bjóða uppá er nakað annað.

Men helst sær tað út til, at samgongan hórar undan, hóast skarpan gang og samanbrestir. Tað lovar tó ikki væl fyri framtíðar stevið hjá hesi samgonguni, at tað hava verið so nógvir stórir snávingarsteinar.

Tíðin fer at vísa, um tað er lági almenni og forsónandi løgmansprofilurin, sum er ein orsøkin til jólafriðin. Ella tað rætt er slætt er staðfestingin av, at her er einki alternativ.

**Sosialurin**

## COP 15 – Ban Ki-moon skeldar

**BOGI ELIASEN**
cand.scient.pol



Nógv hevur verið frammi um veðurlagsfundurin í Keypmannahavn skuldi hava eina politiska ella løgfrøðisliga bindanndi avtalu sum mál. Bali fundurin, sum setti COP 15 í Keypmannahavn á skrá, legði bert dent á, at talan skuldi verða um eina avtalu. Longu í mars í ár, á stórari veðurlagsráðstevnu í Århus, vísti fyrrverandi danski umhvørvismálaráðharrin Svend Auken, sáli, á at tað var ógjørligt at fáa eina løgfrøðisliga bindandi avtalu uppá pláss nú í desember, tí skotbráðið var ov stutt.

Hinvegin, sum vit stjórnmálafrøðingar elska at siga; løgfrøði er bara fastfrystur politkkur. Ein politisk semja er neyðug fyri at kunna fáa eina løgfrøðisliga bindandi avtalu uppá pláss.

**Politiska vikan**
Henda vikan er politiska vikan. Í vikuskiftinum byrjaðu umhvørvismálaráðharrar at koma til COP 15 fundin, og nú koma stjórnarleiðarar. Heilir 115 stjórnarleiðarar hava meldað seg til fundin, sum ger at talan er um kanska størsta altjóða fundin uttanfyri New York nakrantíð. At 115 stjórnarleiðarar koma, merkir eisini at hesi meta at ein politisk avtala kann gerast á fundinum. Men tá so nógvir politiskir oddafiskar eru í býnum, skal ein succes spyrjast burturúr. Spurningurin er tí ikki um ein politisk avtala verður gjørd. Váðin nú er, at fundurin kann enda við eini avtalu, sum var betur ógjørd. Men hetta skal ikki skiljast, sum at alt er í lagið. Í gjár var kreppufundur millum fleiri av stjórnaleiðarunum í valdmiklastu ídnaðarlondunum og ST aðaslskrivarin Ban ki Moon skeldaði á fundi og bað londini arbeiða fram ímóti semju og felags stevi.

**Gjógvin**
Tað er enn langt millum menningarlondini og ídnaðarlondini. Menningarlondini vilja sleppa undan krøvum og hava pengar, og ídnaðarlondini vilja seta krøv til menningarlondini, men sleppa frá at gjalda.

**Vilja vit skilja Kina?**
Sjálvur ásin fyri avtaluni, Kina og USA hava eisini arga hvørnn annan við almennum nervaspæli alla vikuna. Eins og vit í ídnaðarlondunum hava ilt at skilja, at menningarlondini grundleggjandi hava tað fatan, at mannaelvdu veðurlagsbroytingar er ein avleiðing av ríkidøminum sum ídnaðarlondini hava ment, og tí skulu ídnaðarlondini eisini gjalda kostnaðin - so hava vit í okkara søguligu óvitan ilt við at skilja, at Kina sær seg sjálvan sum eitt stórveldi við mætari sivilisatión, sum bara hevur havt eitt bakakst í hálvaaðru øld. M.a. tí bakkar Kina ikki bara fyri USA.

**Governator**
Guvernørurin í Kalifornia, Arnold Schwartzenegger, gjørdi í gjár sína innrás í Keypmannahavn, m.a. fyri at verða við í tiltakinum fyri býir, sum Tórshavnar Kommuna eisini luttøk á. Kalifornia hevur sett umhvørvið og cleantech á skrá, og tí er The Governator spennandi í hesum spælinum. Hann vísti eisini á, at arbeiðið við veðurleagsbroytingunum má verða ein tilgongd, sum kemur frá borgarunum og seyrar upp í politisku skipanina, og ikki bra uppifrá og niður. Borgarstjórarnir, eisini okkara Heðin Mortensen, undirritaðu eina yvirlýsing, sum verður handað stjórnaleiðarum á COP 15.

**Føroyar?**
Sum nevnt í aðrari grein, hava Føroyar ikki verið serliga sjónligar í samband við COP 15. Sum dømi kann nevndast, at Grønland hevur gjørt nógv burturúr, ikki bara nú men eisini í ymsum samráðingum fram til Cop 15 fundin.

Tó so, so hevur átakið BlueGreenFuture luttikið á á sonevndum sideevents, har víst verður á, at BGF arbeiðir fyri at menna eitt umhvørvi fyri at fáa samstarv millum gransking og vinnu við fokussi á nýskapandi cleantech loysnum fyri havumhvørvið í transaltantiska økinum. Tað fræ私ttist frá BGF at tað er áhugi fyri átakinum, sum eisini hevur fingið gott samstarv við Kanada í heyst. BGF byggir á føroyskr førleikar, men leggur stóran dent á at arbeiða transatlantiskt, og tað tykist tað at verða stórur áhugi fyri. Eisini fræ ttist frá felagsbásinum Føroyar hava við Danmark og Grønlandi á COP 15, at hann kundi verið munandi betri, men at tey sum hava spurningar, eru forvitin um Føroyar og Grønland. Seinnaprtin ídag verður so eitt størri tiltak sum Uttanríkisráðið er við í.

Seinasta nýggja er at Connie Hedegaard hevur latið frá samráðingarleiðsluna til danska forsætismálaráðharran Lars Løkke Rasmussen, sum nú skal koyra á mál. Samstundis bleiv eitt nýtt uppskot almannakunngjørt, sum beinanvegin fekk Kina í øðini, so komandi samdøgnini eru spennandi.

**Innsent tilfar**
Av tí at vit fáa rættuliga nógv innsent tilfar sendandi – meira enn vit fáa í blaðið – hevur blaðleiðslan verið noydd at gjørt nakrar avmarkingar.

Enn sum áður skal fult navn skal vera undir øllum innsendum greinum – annars verða tær ikki prentaðar. Harnæst tilskila vit okkum rætt til at ikki at taka við tilfar, sum eisini er sent øðrum bløðum ella hevur verið prentað aðrastaðni.

Drúgvar greinar – greinar sum eru longri enn áleið 5.500 tekn, verða raðfestar lægri, og koma bert í blaðið, um pláss er fyri teimum. Tað er ein fyrimunur um vit fáa tilfarið umvegis teldupost ella á diskli.

**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
**Marknaðarleiðari:** Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Høgni Thomsen hogni@sosialurin.fo
Elin Vatnhamar Olsen evo@sosialurin.fo
Svein Rógvi Nielsen Ljósstein sveinrogvi@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Inna Törnroos inna@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Leo Poulsen leo@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Árni Joensen arni@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Rógvi Nybo rogvi@sosialurin.fo
Eirikur í Jákupsstovu eij@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Kykmyndir:**
Alvin Elleby Andersen alvin@ras2.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 frá kl. 8.00-20.00 og boða frá

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 13[30]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 09 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.